LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið
Postbox 347
Yviri við Strond 15
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 27. august 2024
J.Nr.: LUM-16- 24/17345-17
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr. 24/17363-2

# Álit

um avgerð hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum um avmarkað innlit í upplýsingar um vinnuligar fiskiroyndir

## 1. Niðurstøða umboðsmansins

*Umboðsmaðurin hevur viðgjørt eina klagu um handfaringina hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum av eini umsókn um innlit í vinnuligar fiskiroyndir. Umboðsmaðurin helt, at ráðið ikki hevði gjørt eina nóg ítøkiliga meting av, hvørjir upplýsingar kundu undantakast frá innliti, og at lýsta mannagongdin hjá ráðnum ikki var í samsvar við innlitslógina. Ráðið ásannaði, at ítøkiliga metingin ikki hevði verið nóg neyv og var sinnað at taka málið upp til nýggja viðgerð. Umboðsmaðurin heitti tí á Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið um at taka málið uppaftur og at endurskoða mannagongdina fyri innlitsmál.*

## 2. Klagan

Við teldubrævi, tann 10. juli 2024, hevur A, vegna Kringvarp Føroya, sent umboðsmanninum hesa klagu um avgerð hjá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum (hereftir ráðið):

> "Í sambandi við eina innlitsumbøn til Fiskimálaráðið, vóru nógvar útstrikingar gjørdar, sum tykjast rættiliga tilvildarligar. Tað eru nøvn, og ikki upplýsingar av týdningi, sum eru strikaði. Hetta varð kært, men Fiskimálaráðið helt fast, tí um nøvnini vórðu almenn, kundi tað geva ábending um, hvat verkætlanin snúði seg um. Men har eru nógv onnur nøvn nevnd. Tí góðtaki eg ikki hesa grundgeving og vil tí kæra niðurstøðuna hjá ráðnum."

Innlitsumbønin til ráðið var upprunaliga dagfest 21. februar 2024 og var soljóðandi:

> “...Í sambandi við vinnuligar fiskiroyndir, vóru loyvi til nakrar royndir latin nøkrum feløgum at troyta. Í tíðindaskrivi verður upplýst at 3 virkir og 2 reiðarí skip hava fingið játtan.
> Í hesum sambandi vil eg biðja um innlit í alt tilfar viðvíkjandi B, sum hevur fingið játtað 1200 tons av svartkjafti, tað er millum annað umsókn og játtan...”

Við skrivi, dagfest 26. februar 2024, sendi ráðið soljóðandi svar til KVF:

> “...Soleiðis sum innlitsumbønin er orðað, metir Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið at talan er um hesi skjøl í málinum:
> Umsókn um kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti
> Virkisætlan (forretningsplan)
> Rakstrarætlan fyri D 5 ár
> Rakstrarætlan fyri royndaranlegg ( pilotanlegg) 3 ár
> Svar umsókn
>
> Innlit verður hervið latið í hesi skjøl vísandi til § 4, stk. 1 í innlitslógini:
> Umsókn um kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti
> Virkisætlan (forretningsplan)
> Svar umsókn
>
> Vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 verður innlit ikki latið í
> Rakstrarætlan fyri D 5 ár
> Rakstrarætlan fyri royndaranlegg ( pilotanlegg) 3 ár
>
> Vónandi er hetta svar uppá innlitsumbøn tína. Um tú ynskir innlit í onnur skjøl, verður tú vinaliga biðin um at nágreina, hvørji onnur skjøl tú ynskir innlit í, jb. § 4, stk. 3 í innlitslógini.”

Í telduposti, tann 15. apríl 2024, sendi KVF soljóðandi kæru um latna innlitið til ráðið:

> “Kæra um svar
> Í sambandi við at innlit varð givið, vóru nógvar útstrikingar gjørdar. Millum annað vóru nøvn á persónum útstrikað, onnur ikki. Við hesum verður kært um nakrar útstrikingar, sum vit vinarliga biða tykkum um at taka burtur. Tað tykist løgið at nøvn verða strikaði, tí tey hava einki við sjálvt produktið at gera, sum man opinbart vil ansa eftir, og sum kann vera ein "forrætningsloynidómur".

Á síðu 17 verða tvey nøvn strikaði, sum manna "advisory board" og bert E stendur eftir. Vit biða um, at útstrikingin av hesum nøvnum verður tikin burtur
Á hesi somu síða verður eitt navn eisini strikaði út undir "Forskning og Udvikling. Hetta er aftaná at E og F verða nevndir.
Um hildið verður fast við hesar útstrikingar, verður biðið um eina grundgeving í hvørjum einstøkum føri."

Í skrivi, dagfest 17. apríl 2024, sendi ráðið soljóðandi svar til KVF:

"Svar umbøn um at nøvn verða upplýst, sum vóru fjald í áður givnum innliti.
Í skrivi, dagfest 26. februar 2024, hevur Kringvarp Føroya fingið innlit í skjøl, sum viðvíkja kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti, sum er latin felagnum B. Vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 er innlit ikki latið í ávís skjøl, eins og upplýsingar eru fjaldar í teimum skjølum, sum innlit varð latið í.
Í skrivi, dagfest 15. apríl 2024, verður biðið um, at nøvn sum vóru fjald tá innlit varð givið, verða upplýst. Sagt verður frá, at tað framhaldandi verður hildið fast um, ikki at geva innlit í hesi nøvn, vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2.
Biðið verður um, at grundgivið verður fyri hví umbønin um innlit verður noktað. Sum nevnt verður innlit noktað, vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2. Mett verður, at um hesi nøvn verða upplýst, kann hetta geva ábending um hvat verkætlanin snýr seg um og kann hetta hava óhepnar avleiðingar fyri menningina av verkætlanini."

## 3. Viðmerkingar frá myndugleika

Tann 10. juli 2024 varð klagan send ráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi eina viku. Samstundis varð ráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum umframt skjalayvirlit.

Tann 12. juli 2024 sendi ráðið umboðsmanninum viðmerkingar sínar og greiddi millum annað soleiðis frá málsgongdini og avgerð síni:

"Málsgongdin
Tann 21. februar 2024 biður klagarin vegna Kringvarpið um alment innlit í tilfar viðvíkjandi B, undir hesum umsókn og játtan til 1200 tons av svartkjafti. Víst verður til vinnuligar fiskiroyndir. (viðfesta skjal 1)
Tann 23. februar svarar Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið, at arbeitt verður við at svara umbønini, og at tað eina skjalið, sum ætlanin er at geva innlit í, verður sent B til viðmerkingar, áðrenn innlit verður givið. Svarað verður skjótast gjørligt eftir hetta. (Skjal 2)
Teldubræv verður sent B 23. februar. (Skjølini 3 og 3.1.)

> Klagarin rykkir eftir svari 26. februar. (Skjal 4)
> 26.februar svarar B, at ongar viðmerkingar eru til tað, sum Ráðið ætlar at strika út, og ynski er ikki um at strika aðrar upplýsingar. (Skjal 5)
> Avgerðin og skjølini verða send klagaranum við teldubrævi 26. februar. (Skjal 7)
> Tann 15. apríl vendir klagarin aftur og ynskir innlit í onkrar av teimum upplýsingum, sum vóru strikaðar. (Skjal 10)
> B verður biðið um viðmerkingar til hesa umbøn 16. apríl, og viðmerkir, at innlit ikki skal latast. (Skjølini 11 og 12)
> Svar verður sent klagara 17. apríl, at innlit verður sýtt í hesar upplýsingar. (Skjal 13)
> Viðmerkingar til málið
> Sum longu nevnt biður klagarin um innlit í tilfar viðvíkjandi B, undir hesum umsókn og játtan til 1200 tons av svartkjafti. Víst verður til vinnuligar fiskiroyndir (skjal 1)
> Ráðið upplýsir í svarinum, at umbønin er mett at fevna um hesi skjøl:
> 1. Umsókn um kvotu til vinnuligar fiskiroyndir eftir svartkjafti
> 2. Virkisætlan (Forretningsplan)
> 3. Rakstrarætlan fyri D 5 ár
> 4. Rakstrarætlan fyri royndaranlegg (pilotanlegg) 3 ár
> 5. Svar uppá umsóknina
>
> Av hesum skjølum verður innlit ikki latið í rakstrarætlanirnar - skjølini nr. 3 og 4 - vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Klagarin sæst ikki at vera ósamdur við hesum parti av avgerðini.
> Eftir eru skjølini nr. 1, 2 og 5, og Ráðið upplýsir, at innlit verður latið í hesi. Tað framgongur tó av skjølunum, sum eru send, at upplýsingar eru strikaðar út, og tá hetta ikki framgongur av avgerðini, og heldur ongin grundgeving er fyri hesum, er avgerðin ikki nóg nágreinilig viðvíkjandi hesum. Tað kann tó upplýsast, at tær upplýsingar, sum eru útstrikaðar, eisini eru mettar at vera fevndar av § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit.
> ...
> Klagarin vendir tó seinni aftur til Ráðið við klagu viðvíkjandi nøkrum ávísum upplýsingum í hesum skjølum, og Ráðið skilur klaguna soleiðis, at hon fevnir bert um hesar upplýsingar. Klagan til Løgtingsins Umboðsmann sæst at fevna um somu upplýsingar.
> Í teldubrævi til Ráðið vísir klagarin til síðu 17 í tilfarinum, har tvey nøvn eru strikað út. Talan er um nøvn á persónum, sum sita á “advisory board” hjá felagnum. Eisini verður víst til eitt navn, sum stendur undir “Forskning og Udvikling”.
> Ráðið hevur hildið fast við at sýta innlit vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í lógini um alment innlit. Grundgevingin er, at nøvnini kunnu geva ábending um, hvat verkætlanin snýr seg um, og kann hetta hava óhepnar avleiðingar fyri menningina av verkætlanini....”

Tann 15. juli 2024 kunnaði umboðsmaðurin klagarin um, at umboðsmaðurin hevði móttikið umbidnu skjølini frá Fiskivinnu- og samferðslumálaráðnum. Umboðsmaðurin fór at kunna seg

um málið, áðrenn hann tók støðu til víðari viðgerð og roknast mátti við longdari viðgerðartíð vegna summarfrítíð.

Viðmerkingarnar frá ráðnum vórðu ikki sendar klagara til ummælis av tí, at tað ikki varð mett neyðugt.

Við skrivi, dagfest 15. juli 2024, spurdi umboðsmaðurin ráðið, hvørja ítøkiliga meting ráðið hevði gjørt sær av vandanum fyri fíggjarligum missi, sum upplýsingin av nøvnunum undir "Advisory Board" og "Forskning og udvikling" vildi ført við sær. Eisini spurdi umboðsmaðurin um, hvørja ítøkiliga meting ráðið hevði gjørt av vandanum fyri fíggjarligum missi, um upplýsingarnar um nøvn á skipi, virkjum og feløgum varð latið.

Freistin hjá ráðnum at svara varð sett til 12. august 2024.

Tann 12. august 2024 sendi ráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> "...Viðvíkjandi tí ítøkiligu metingini, sum Ráðið hevur gjørt sær av vandanum fyri fíggjarligum missi, sum upplýsingin av nøvnunum av ávísum persónum vildi ført við sær, má Ráðið ásanna, at tann ítøkiliga metingin ikki hevur verið nóg neyv.
>
> Gongdin er tann, at Ráðið í fyrstu atløgu hevur strikað hesar upplýsingar, tí tær kunnu hava fíggjarligan miss við sær. Eftir at Kringvarpið vendir aftur, og beinleiðis ynskir innlit í hesar upplýsingar, verður umbønin send B til viðmerkingar. B viðmerkir, at innlit ikki skal latast í nøvnini. Hetta verður grundað á langtíðarvirksemi viðvíkjandi menningini, og at innlitið kann geva indikatión um, hvønn rætning menningin er sett til...
>
> Ráðið grundar sítt svar á hesa upplýsing, tó uttan at kanna málið nærri.
>
> Ráðið má tí ásanna, at Ráðið hevur ikki nøktandi grundarlag fyri at taka støðu til innlit í hesar upplýsingar. Neyðugt er at upplýsa málið nærri, og Ráðið er sinnað at viðgera hetta umaftur. Bíðað verður tó eftir endaligari niðurstøðu frá Umboðsmanninum í hesum máli, soleiðis at møguligir aðrir spurningar kunnu viðgerast samstundis.
>
> Viðvíkjandi tí ítøkiligu metingini, sum Ráðið hevur gjørt av vandanum fyri fíggjarligum missi, um upplýsingarnar um nøvn á skipi, virkjum og feløgum varð latið, skal Ráðið viðmerkja, at her er aftur talan um eina heldur yvirskipaða meting.
>
> Tá talan er um innlitsmál, sum eru stór í vavi og innihalda lutfalsligar nógvar upplýsingar, sum møguliga kunnu hava fíggjarligan miss við sær fyri tann, sum málið viðvíkur, er trupult og orkukrevjandi at viðgera allar upplýsingar neyvt í fyrstu atløgu. Ráðið dúvar tí á, at

> viðkomandi, sum biður um innlit, arbeiðir saman við Ráðnum fyri at koma mál. Hetta merkir, at Ráðið í fyrstu atløgu strikar upplýsingar, sum kunnu hava við sær fíggjarligan miss, tó uttan at Ráðið í øllum førum hevur neyvt grundarlag fyri hesum. Ráðið heitir síðani á viðkomandi, um at venda aftur, um innlit ynskist í meira. Tá viðkomandi hevur fingið innlit í fyrstu atløgu, ber oftast til hjá viðkomandi at siga neyvari, hvørjar upplýsingar viðkomandi ynskir innlit í víðari, um nakrar. Um viðkomandi vendir aftur og ynskir innlit í fleiri upplýsingar, verða hesar neyvari viðgjørdar.
>
> Hendan mannagongd hevur við sær, at innlit helst ikki altíð verður latið í onkrar upplýsingar, sum innlit eigur at vera latið í, men tá áhugi ikki er í hesum upplýsingum, er hetta vónandi ikki ein trupulleiki. Mannagongdin verður eisini bert brúkt í málum, har talan er um upplýsingar, sum kunnu hava fíggjarligan miss við sær fyri borgarar.
>
> Viðvíkjandi tí ítøkiliga málinum, so er innlit ikki latið í  nøvn á skipi, virkjum og feløgum, tí Ráðið í fyrstu atløgu hevur mett, at hesar upplýsingar kunnu hava við sær fíggjarligan miss fyri B. Talan er um ... og tað er tí ivasamt, um grundarlag er fyri at nokta innliti. ... Onkur sjónarmið eru um hetta, men tey mugu kannast nærri. Tá hesar upplýsingar hinvegin neyvan hava týdning fyri KvF, sum heldur ikki hevur nevnt hesar upplýsingar í sambandi við uppfylgjandi innlitsumbønir, so vónar Ráðið, at tað er í lagi, um Ráðið ikki ger meira við hendan partin av málinum..."

Í telduposti, tann 13. august 2024, varð klagarin kunnaður um, at umboðsmaðurin hevði sett ráðnum nágreinandi spurningar, at hann nú hevði fingið svar til spurningarnar, og at umboðsmaðurin var farin undir endaliga viðgerð av málinum. Sama dag boðaði umboðsmaðurin ráðnum frá, at farið varð undir endaliga viðgerð av málinum.

## 4. Niðurstøða

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um avmarkaða innlitið, sum Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið lat KVF í sambandi við áheitan um innlit í vinnuligar fiskiroyndir. Ítøkiliga varð biðið um innlit í alt tilfar viðvíkjandi B, sum hevði fingið játtað 1200 tons av svartkjafti, millum annað umsókn og játtan.

Ráðið gav í fyrstu syftu innlit í trý av fimm skjølum við útstrikingum í latnu skjølunum, uttan grundgeving fyri útstrikingunum. Klagarin kærdi avgerðina og bað um, at ávísar útstrikingar skuldu takast burtur, ella at ítøkilig grundgeving varð givin í hvørjum einstøkum føri. Ráðið svaraði klagaranum, at hildið varð fast í ikki at geva innlit í nøvnini, sum vóru fjald, vísandi til § 12, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini. Sum grundgeving vísti ráðið á, at ráðið metti, at um nøvnini

vórðu upplýst, kundi tað geva ábending um, hvat verkætlanin snúði seg um, og kundi hava óhepnar avleiðingar fyri menningina av verkætlanini.

<u>Noktan av innliti sambært § 12, stk. 1, nr. 2</u>
§ 12, stk. 1, nr. 2 og stk. 2 í innlitslógini er soljóðandi:

> "Undantøka av upplýsingum
> § 12. Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um
> 1) ...
> 2) tøkniligar útbúningar ella mannagongdir, ella um rakstrar- ella vinnuviðurskifti ella líknandi um so er, at tað hevur stóran fíggjarligan týdning fyri tann persónin ella virkið, sum upplýsingin viðvíkir, at áheitanin ikki verður gingin á møti.
> Stk. 2. Um bert ein partur av skjalinum kemur undir ásetingina í stk. 1, skal hann verða kunnaður við hin partin av innihaldinum í skjalinum."

Treytin fyri at undantaka upplýsingar um rakstrar- og vinnuviðurskifti er, at tað ítøkiliga verður mett, at vera stórur vandi fyri fíggjarligum missi fyri tað ella tey virki, sum upplýsingarnar viðvíkja, um innlit verður latið. Tað skal vera greitt samband millum, at innlit verður latið í upplýsingarnar og vandan fyri, at fyritøkurnar missa pening.

Sambært ásetingini skal myndugleikin, t.v.s. her Fiskivinnu – og samferðslumálaráðið, meta um, hvussu ein møguligur fíggjarligur missur fer ella kann fara at vísa seg sum avleiðing av, at innlit verður latið í umbidnu upplýsingarnar. Ivast myndugleikin í hesum, eigur myndugleikin at spyrja fyritøkuna, sum upplýsingarnar viðvíkja. Eitt slíkt ummæli er ikki bindandi fyri myndugleikan, ið skal taka avgerð við støði í sjálvstøðugari meting.

Ráðið hevur sýtt innlit í tvey skjøl í síni heild, sum innihalda rakstrarætlanir. KVF hevur ikki klagað um hendan partin, og eg geri tí ikki meira við hendan partin av málinum. Eg fari tó at vísa ráðnum á, at undantøka eftir § 12, stk. 1, nr. 2 krevur eina ítøkiliga meting, og at KVF eigur at verða kunnað við hin partin av innihaldinum í skjølunum, um bara ein partur av skjølunum kemur undir ásetingina í § 12, stk. 1, nr. 2.

Í sambandi við, at ráðið hevur strikað nøvn í latnu skjølunum undir "Advisory Board" og "Forskning og Udvikling", hevur ráðið grundað avgerð sína á upplýsingar frá felagnum, uttan at kanna hetta nærri. Ráðið hevur yvirfyri umboðsmanninum ásannað, at ráðið tí ikki hevði nøktandi grundarlag fyri at taka støðu til innlit í hesar upplýsingar, og at tann ítøkiliga metingin í mun til at strika nøvnini ikki hevur verið nóg neyv.

Umframt omanfyri umrøddu strikaðu nøvn vóru eisini nøvn á skipi, virkjum og feløgum strikað í latna innlitinum. Ráðið hevur í hesum sambandi greitt frá mannagongd síni í sambandi við innlitsmál, sum eru stór í vavi og innihalda lutfalsliga nógvar upplýsingar, sum møguliga kunnu hava fíggjarligan miss við sær fyri tann, sum málið viðvíkur:

> "Tá talan er um innlitsmál, sum eru stór í vavi og innihalda lutfalsligar nógvar upplýsingar, sum møguliga kunnu hava fíggjarligan miss við sær fyri tann, sum málið viðvíkur, er trupult og orkukrevjandi at viðgera allar upplýsingar neyvt í fyrstu atløgu. Ráðið dúvar tí á, at viðkomandi, sum biður um innlit, arbeiðir saman við Ráðnum fyri at koma mál. Hetta merkir, at Ráðið í fyrstu atløgu strikar upplýsingar, sum kunnu hava við sær fíggjarligan miss, tó uttan at Ráðið í øllum førum hevur neyvt grundarlag fyri hesum. Ráðið heitir síðani á viðkomandi, um at venda aftur, um innlit ynskist í meira. Tá viðkomandi hevur fingið innlit í fyrstu atløgu, ber oftast til hjá viðkomandi at siga neyvari, hvørjar upplýsingar viðkomandi ynskir innlit í víðari, um nakrar. Um viðkomandi vendir aftur og ynskir innlit í fleiri upplýsingar, verða hesar neyvari viðgjørdar.
>
> Hendan mannagongd hevur við sær, at innlit helst ikki altíð verður latið í onkrar upplýsingar, sum innlit eigur at vera latið í, men tá áhugi ikki er í hesum upplýsingum, er hetta vónandi ikki ein trupulleiki. Mannagongdin verður eisini bert brúkt í málum, har talan er um upplýsingar, sum kunnu hava fíggjarligan miss við sær fyri borgarar."

Útgangsstøðið sambært innlitslógini er, at rætturin til innlit fevnir um øll skjøl, og at tað krevst ein lógarheimild fyri at nokta innlit. Um partar av einum skjali skulu afturhaldast krevst eisini lógarheimild til tess.

Um so er, at ráðið ivast í, hvørt borgarin ynskir innlit í eina ávísa upplýsing ella ávíst skjal, má hetta avklárast við umsøkjaran, áðrenn viðgerð av innlitsumbønini.

Tað er ikki í samsvar við innlitslógina, um ráðið strikar upplýsingar uttan eina ítøkiliga meting av, um upplýsingarnar eru fevndar av ávísari undantøku í innlitslógini. Ráðið hevur eina skyldu, sambært innlitslógini, at lata innlit í umbidna tilfarið, óansæð um borgarin seinni klagar um striking av upplýsingum ella ikki. Eg haldi tí, at nevnda mannagongdin hjá ráðnum ikki er í samsvar við innlitslógina.

Eg gevi mær far um, at ráðið er sinnað at taka málið upp til nýggja viðgerð við tí fyri eyga at gera eina ítøkiliga meting eftir § 12, stk. 1, nr. 2 og stk. 2.  Vísandi til viðmerkingar mínar fari eg tí at biðja ráðið um at taka málið uppaftur. Harumframt fari eg at mæla ráðnum til at endurskoða nevndu mannagongd sína í sambandi við innlitsmál, sum eru stór í vavi og innihalda lutfalsligar nógvar upplýsingar.

Eg fari at biðja Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið lata meg frætta aftur um úrslitið av viðgerðini.

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður